Tjaldur-Kyndil 30-19 (15- 9)

# Tjaldur fekk tvey stig



Tjaldur fekk tvey sera týdningarmikil stig í dystinum móti Kyndli mikukvøldið. Longu eftir fyrra hálvleik hevði Tjaldur vunnið sær eina trygga leiðslu yvir Kyndli, sum ikki formáddi sær nakað serligt móti Tjaldri.

Liðini fylgdust bæði til eini tíggju minuttir vóru eftir at fyrra hálvleiki. Tá dróg Tjaldur frá kyndilskvinnum. Kyndil megnaði ikki at berja seg innaftur í dystin í seinna hálvleiki, tá munurin bara vaks.

Tjaldur hevur við hesum sigrinum hála seg tvey stig frá botnsessinum, har Sóljan liggur í løtuni. Tjaldur hevur nú seks stig, meðan Sóljan hevur fýra stig.

Teir 31 áskoðararnir í høllini í Runavík sóu sostatt lið sítt fáa ein sjáldsaman sigur til høldar.

Hjá Tjaldri skeyt Beinta Joensen átta mál, meðan Melitze Ergic gjørdi sjey. Ann Hansen og Lotte Sørensen skutu fimm mál í part fyri Kyndil.

Tjaldur-Kyndil 20-25 (7-15)

# Kyndil helt fast



1. mansliðið hjá Kyndli vann mikukvøldið á Tjaldri inni í Runavík. Longu eftir fyrra hálveik hevði Kyndil eina trygga leiðslu, men Tjaldur minkaði nakað um munin eftir steðgin.

Tjaldur megnaði at fylgja við eina løtu við byrjan av dystinum, men Kyndil fekk síðani seks mál á rað uttan at Tjaldur svaraði aftur. Hetta at kalla avgjørdi dystin.

Kyndil er nú bara eitt stig aftanfyri StÍF á øðrum plássi. Kyndil roynir nú at vinna sær silvurið, og tað verður antin Kyndil ella StÍF, sum fer avstað við tí.

Hjá Kyndli skeyt Hans Áki Dahl-Christiansen níggju mál, meðan Hanus Jensen gjørdi seks. Sverri Justinussen og Dejan Macurt skutu fýra mál hvør fyri Tjaldur.

## KROSSORÐ



**Vinnari:**

*Tomasia Njálsdóttir*
*850 Hvalba*

Loysnin frá seinastu viku
Loysunarorðið: HAVNARGØTUR



### Hvønn fríggjadag

er krossorðagáta í blaðnum. Drigið verður millum røttu innsendu loysnirnar. Vinningurin er ein bók frá Bókadeild Føroya Lærarafelags ella Føroya Skúlabókagrunni. (Krossa av á listanum høgrumegin, hvørja tú best kundi hugsað tær).

Fyri at verða við í dráttinum um vinningin, má loysunarorðið vera okkum í hendi í seinasta lagi hósdagin. Vinnarin verður saman við loystu gátuni kunngjørdur í blaðnum næsta fríggjadagin.

Sendið loysunarorðið til: Sosialurin, Box 76, 110 Tórshavn – og viðmerkið »Krossorðagáta nr. ...« á bjálvan.

**264**

**Loysunarorðið:** ............................................

Navn: ..............................................................

Bústaður: .....................................................

Bygd/býur: .....................................................

***Lesið føroyskt - hugsið føroyskt!***

Frá ***BÓKADEILD FØROYA LÆRARAFELAGS:***

- ❑ **Úti á leysum oyggjum** - *Marianna Debes Dahl*
- ❑ **Matur í myndum** - *Sigrid Dalsgaard/ Beinta Johannesen*
- ❑ **Í skýmingini** - *Sofía Petersen/Elinborg Lützen*
- ❑ **Meistarin og teir fýra skrivararnir** - *Ulf Nilsson/Karl N. Hansen týddi*

Frá ***FØROYA SKÚLABÓKAGRUNNI:***

- ❑ **Málllæra** - *Paulivar Andreasen/Árni Dahl*
- ❑ **Rura** - *Þóra Þóroddsdóttir*
- ❑ **Føroya jarðfrøði** - *Jóannes Rasmussen*
- ❑ **Íslandsklokkan** - *Halldór Laxness*
- ❑ **Fólk og mentan** - *Jóan Pauli Joensen*

***Bøkur og annað tilfar - bæði innan og uttan skúlagátt***




# Framleiðslutól til fiskavirking til sølu

Um hóskandi boð fæst, verða framleiðslutólini hjá Sp/f Fagralíð við hesum lýst til sølu.

Virkið hevur rikið fiskaframleiðslu, og hevði í ár 2000 ein umsetning uppá uml. 35 mió.

**Talan er um m.a. um hesa útgerð:**
Scania lastbilur, rúmar 16 plattar
Gaffiltrukkur og lyftivognur
Skeriborð til 10 fólk
Sorterings- og vektarskipan
Etikettuprintara og bandmaskinu
Slógvkvørn
Kantinu- og skrivstovuinnbúgv
Kassar og kør

Virkið heldur til í leigaðum hølum á Vestaru Bryggju, Tórshavn, og møguleiki er at yvirtaka leigusáttmálan eftir nærri avtalu við Tórshavnar Havn.

Virkið er løggilt eftir matvørulógini, eins og innvigingarskipanin er góðkend eftir reglunum í fiskiveiðilógini. Viðmerkjast skal tó, at tann sum keypir framleiðslutólini við atliti uppá framhaldandi fiskaframleiðslu sjálvur má taka hesi viðurskifti upp við avvarðandi myndugleikar.

Framleiðslutólini verða sýnd fram eftir nærri avtalu.

**Annfinn V. Hansen**
**Advokatfirma**
Gongin • Postrúm 106
110 Tórshavn
Tlf. 319595 • Fax 315499



# AVLOYSARAR
## Heimarøktin

søkir eftir

**Heimasjúkrasystrum og Heimahjálparum sum feriuavloysarar í summar.**

Umsókn verður at senda sum skjótast til hesi øki:

**Heimarøktin – Suðurstreymoy**
Skálatrøð 14
100 Tórshavn

**Heimarøktin – Vágoy/Norðurstreymoy**
Heilsumiðstøðin
370 Miðvágur

**Heimarøktin – Eysturoy**
Heilsumiðstøðin
620 Runavík

**Heimarøktin – Suðuroy**
900 Vágur

**Heimarøktin – Sandoy**
Áargarður
210 Sandur



T Ó R S H A V N A R K O M M U N A

# Verkfrøðingur
*Endurlýsing*

Á teknisku deild Tórshavnar kommunu er eitt avloysarastarv sum verkfrøðingur/starvsfólk við tekniskari útbúgving innan heilsu- og umhvørvi leyst at søkja.

**Starvið**
ið er eitt avloysarastarv, er sett til eitt ár, og fevnir um umsiting av heilsu- og umhvørvismálum hjá Tórshavnar kommunu.

**Arbeiðsuppgávur**
umsøkjarin kemur m.a. at arbeiða við:
- Umsiting av ymiskum loyvum
- Luttaka í byggimálsviðgerð við tilknýti til heilsu- og umhvørvismál

Røkja umhvørviseftirlit við teimum uppgávum, ið tekniska deildin umsitir. (Kommunalar kloakkir)

**Kommunan bjóðar**
eitt áhugavert og mennandi starv við nógvum avbjóðingum.

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður sett skjótast til ber. Løn sambært sáttmála millum Føroya landsstýri og avvarðandi yrkisfelag.

**Meira fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Boða Haraldson, býðarverkfrøðing, ella Marius Müller, tekniska stjóra, tlf. 31 51 60.

**Umsóknir**
saman við upplýsingum um útbúgving, royndir og møguligum viðmælum skulu vera Tórshavnar kommunu, postrúm 32, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi 15. apríl 2001. Viðmerk á umsóknina "starv á teknisku deild til heilsu- og umhvørvismál"

S N A R S K I V A N



**Mentamálastýrið**

# Kunngerð

Tað verður við hesum gjørt kunnugt, at

**skúlastýrisval**

verður í øllum sjálvstøðugum fólkaskúlum við innskrivaðum næmingum, mánadagin 28. mai 2001.

**Mentamálastýrið**



# Musikkskúlaskipanin

Søkir eftir lærarum í hesum greinum til setan í august 2001.

Sello. Fulltíðarstarv. Bústaður verður í Klaksvík. Undirvísingarstøð: Klaksvík og Eysturoy. Førleiki á øðrum ljóðføri er fyrimunur.

Messing. Fulltíðarstarv. Bústaður verður í Vágum. Førleiki í orkesturleiðslu er fyrimunur.

Rútmiskari tónleikanámsfrøði. Fulltíðarstarv. Bústaður verður í Eysturoy.
Undirvísingarstøð: Eysturoy og Klaksvík.
Fakini eru gittar, el bass, slagverk, samanspæl og forskúli.

Sangi og klaver. Fulltíðarstarv. Bústaður og undirvísing verður í Suðuroy.
Royndir í barnasangi og kórleiðslu krevjast.

Blokkfloytu/klarinett/saxofon/fagott. Starvið er 3/4 av fulltíðarstarvi.
Undirvísingarstøð: Norðurstreymoy og Tórshavn.
Royndir í bólkaundirvísing er fyrimunur.

Sangi. Fulltíðarstarv. Bústaður verður í Tórshavn.
Undirvísingarstøð: Tórshavn og Norður Eysturoy.
Undirvísingarroyndir í rútmiskum sangi krevjast.

Klaver. Fulltíðarstarv. Bústaður verður í Tórshavn.
Undirvísingarstøð: Tórshavn og Norðurstreymoy.
Hollur dugnaskapur í fylgispæli krevst.

Klaver. Tíðaravmarkað 3/4 starv skúlaárið 2001/2002.
Undirvísingarstøð: Tórshavn og Nes Sókn.

**Førleikakrøv:** Musikkpedagogiskt prógv frá konservatorium ella onnur javnsett hægri tónleikaútbúgving. Framførsluroynd krevst í sambandi við setan.

Lønar- og setanarviðurskifti sambært sáttmala millum Fíggjarmálastýrið og Musikklærarafelagið.

Umsóknarfreist: 7. mai 2001

Meira fæst at vita hjá leiðaranum Martin Mouritsen á tlf 216462 ella
t-posti: martin@mms.fo

Umsókn skal sendast til:
**Mentamálastýrið**
Musikkskúlaskipanin
Martin Mouritsen, leiðari
Hoyvíksvegur 72
FO 100 Tórshavn
T-postur: martin@mms.fo
Tlf 316462 / 216462
Fax 316991

Í musikkskúlaskipanini eru í løtuni tilsamans 1150 næmingar. Skúlarnir eru Tórshavnar, Klaksvíkar, Suðuroyar, Norðurstreymoyar, Vága, Nes Sóknar, Fuglafjarðar, Norðljómur, Sandoyar, Leirvíkar, Stranda, Skála, Oyndarfjarðar og Fossánesar Musikkskúlar.

Kommunalir myndugleikar skipa karmar, sum leiðari á staðnum fyrisitur. Lærararnir hava hægri tónleikaútbúgving. Mentamálastýrið hevur fakligu og námsfrøðiligu ábyrgdina av undirvísingini.


Sosialurin -har tað hendir